gult2 cyan2 magenta2 svart2



# Fjúrtan myndlistafólk sýna fram í Norðurlandahúsinum

**Í morgin letur upp árlgia summarframsýningin í Norðurlandahúsinum upp**

MYNDA-FRAMSÝNING
*Eirikur Lindenskov*

Tað verður Høgni Hoydal, landsstýrismaður, sum letur upp framsýningina í Norðurlandahúsinum, har fjúrtan føroysk myndlistafólk sýna fram.

Á hvørjum ári hevur Norðurlandahísð tikið stig til eina myndlistaframsýning á sumri, og á framsýningini í fjør vórðu málningar hjá Edwardi Fuglø sýndir fram. Í ár hevur Norðurlandahúsi boðið ikki færri enn fjúrtan myndlistafólkum, sum øll eru búsitandi í Føroyum, at sýna fram.

Frá í morgin og julimánaðin allan verður Norðurlandahúsið á tremur við føroyskari list. Í forhøllini sýna tey trý, Amariel Norðoy, Tróndur Patursson og Astrid Andreasen fram.

Amariel sýnir fram fimm litfagrar málningar, har tlitirnir grønt og blátt eru fremstir. Mót glugganum til vinstru síggjast tólv av eyðkendu fuglunum hjá Tróndi á flogi, og fyri frammam í forhøllini hongur stórt tekstilverk niður úr loftinum. Tað er Astrid Andreasen, sum í mong ár hevur savnað tilfar til patchwork úr bundnum, litaðum tilfari. Úrslitið, sum hon hevur seymað í hond við smáum stingum, rópar Astrid »Teigar«. Nógvar søgur hanga uppi við hesum hugtakandi verki, m. a. troyggjur, bundnar úti um landið og keyptar í Blá Kross búðini og silki úr gomlu Tórsbúð í Havn.

Í Klingruni sæst ein stór, nýggj mynd fra´meistarans hond. Hetta er lívssterk skitsa, tikin beint úr verkstaðnum hjá Ingálvi. Hesum Nestorinum í føroyskari mánlingalist, sum Malan Marnersdóttir tekur til í bóklinginum, sum lýsir Summarframsýningina í Norðurlandahúsinum í ár.

Á stóra hvíta vegginum í Klingruni hanga umfram Ingálv, eisini verk eftir Bárð Jákupsson og Zacharias Heinesen.

Fram við gluggunum, oman moti Havnini, sýna tey fýra Eyðun av Reyni, Olivur við Neyst, Astri Luihn og Kári Svensson fram. Olivur sýnir fram eina røð av løttum vatnslitsmyndum.

Sveimandi undir loftinum í Klingruni hongur tekstilverk hjá Titu Vinther. Hetta er nót, ella trol, ið hon rópar »Pætursnót«. Nótin er fimm metrar long og er evnað til úr mannahári.



*Kári Svensson og Zacharias Heinesen eru við at leggja síðstu hond á Summarframsýningina í Norðurlandahúsinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Í Dansistovuni í Norðurlandahúsinum síggjast verk eftir Tórbjørn Olsen, Sigrun Gunnarsdóttir Niclasen og Edward Fuglø.

Umframt landslagsmyndir, sýnir Torbjørn fram stóra portrettmynd av bróðirsoninum. Tey bæði seinni, Sigrun og Edward, arbeiða bæði við kristnum súmbolum. Myndarøðin hjá Edwardi, sum er hin yngsti av teimum fjúrtan framsýnarum, lýsir tær sjey deyðssyndirnar.

Tað eru Zacharias Heinesen og Astri Luihn, sum fyri Norðurlandahúsið hava skipað fyri summarframsýningini í ár. Listafólkini hava tó sjálv hjálpt til við at hanga upp verkini. Astri sigur, at ikki færri enn fimm hundrað innbjóðingar eru sendar út til fólk at verða til staðar, tá Summarframsýningin letur upp leygardagin. Eisini fólk, sum varða av myndlist í útlondum og reka framsýningarhøli eru boðin við.

## NØVN Í VIKUNI

### Lovisa Nielsen farin



Mikudagin varð Lovisa Nielsen borin til gravar, 92 ára gomul. Petra Lovisa Nielsen, sum hon skrivaðist, f. Lervig, varð borin í heim í Leirvík 2. september í 1908, og andaðist hon 3. juni á Ellisheiminum í Havn.

Lovisa giftist Jákupi Nielsen úr Nólsoy, í Liða. Tey áttu fýra børn, Rodmund, Olaf, Øssur og dóttrina Gunnvør.

Lovisa man vera ein av teimum fáu húsmøðrunum, sum hevur hildið hús bæði í bygd og bý og í einbýli og átt gávurnar at vera bæði manni og børnum sínum mikil stuðul.

Tey festu búgv í Vági í 1930, tá var Jákup skipari á »Grace« ella Grasinum, sum tað varð kallað, har hann var skipari frá 1930-3 9. Frammanundan hevði hann verið ein av slóðbrótarunum hjá føroyingum í Grønlandi í Føroyingahavnini.

Í 1940 fluttu tey út á Borðuna, har Jákup var vitameistari eitt skifti. Síðani fluttu tey út í Mykineshólm, har tey vóru til 1954, tá bústaðurin aftur var Borðan, har Jákup var vitameistari til hann fór frá fyri aldur í 1969. Tá fluttu tey til Havnar at búgva uppi í Pedda við Steinsgøtu.

Jákup var løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin frá 1936-43.

# Tøkk

Teimum, sum við telegrammum, gávum og telefonsamrøðum mintust meg á 75 ára degnum tann 28. mai 2001, takki eg hjartaliga.

**Einar Mikkelsen**
**Vágur**

# Landslag og formur

MYNDA-FRAMSÝNING
*Eirikur Lindenskov*

Í sambandi við Summarframsýningina gevur Norðurlandahúsið út snøggan bókling, har Malan Marnersdóttir greiðir frá um føroyska list. Bóklingurin lýsir eisini øll tey fjúrtan listafólkini, sum eru á framsýningini.

Í bóklinginum sigur Malan Marnersdóttir m. a., at landslagið hevur at kalla verið tjóðarmotivið í føroyskari list og at »tað er felags umberingin fyri at arbeiða við kjarnanum í nútíðar list«.

Malan Marnersdóttir slær fast, at vissuliga eru landslagsmálararnir komnir langt við myndaevni sínum og eisini nýggjum royndum við liti, sniðið, tilfari og samanseting.

– Men hjá yngri listafólkum eru onnur myndaevni um at vinna á landsløgunum, sigur Malan og leggur afturat, at »ein reinari« mordernistiskur áhugi fyri forminum sum innihald ger so hvørt uppaftur meira vart við seg.

# Litavisk vitjan

TÓNLEIKUR

Í hesum døgum eru litavisku fólkatónleikararnir, hjúnini Algirdas Klova og Jurate Klova og vitja í Føroyum. Tey komu til landið fyrst í vikuni og hava longu havt fleiri konsertir, men enn er møguleiki at hoyra tey framføra. Seint fríggjakvøldið spæla tey í Manhattan í Havn, og leygarkvøldið 9. juni kl. 20.00 verða tey at hoyra umborð á sluppini Høganesi í Runavík. Sunnukvøldið spæla tey í Café Natúr í Havn.

Á skránni eru litaviskir fólkasangir og instrumental løg, spæld við fiól og ymiskum siðbundnum litaviskum ljóðførum.

Algirdas og Jurate hava áður verið at hoyrt í Føroyum. Í 1997 vóru tey við í einum størri ferðalag við listarfólkum úr baltisku londunum í sambandi við Baltisku vikuna, ið Norðurlandahúsið skipaði fyri tað árið.

Føroya Fólkatónleikarafelag, Norðurlandahúsið í Føroyum og Nordisk Informationskontor í Vilnius skipa fyri og stuðla ferðini hjá Algirdas og Juratu Klova til Føroya nú í summar.



*Algirdas Klova úr Litavia við violinini*

gult3 cyan3 magenta3 svart3






Tá tú skalt gera íløgur í virðisbrøv, skalt tú hugsa teg væl um, tí hvør leikur hevur týdning. Kaupthing er til reiðar at seta saman íløguna, sum passar júst til tín tørv og títt lyndi - eina íløgu sum tú kanst vera tryggur við.

KAUPTHING
Føroyar
Virðisbrævameklarafelag
Tinghúsvegur 14 • FO-110 Tórshavn
tel. 35 1500 • fax 35 1501
www.kaupthing.fo